ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

22. januar 2025

**Tilmælini frá hoyringini í breksáttmálanum – á føroyskum[1]**

Føroyar tóku í 2009 undir við sáttmála Sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek – breksáttmálanum.

Tann 23. august 2024 vóru Føroyar til hoyring hjá ST í breksáttmálanum. Hetta er aðru ferð at Føroyar eru til hoyring í breksáttmálanum, og byrjaði tilgongdin til hetta longu í 2019 við undan hoyring, har MEGD luttók, og Føroya landsstýrið sendi skrivliga frágreiðing. Fyrra hoyringin var í 2014.

Endamálið við hoyringini er at kanna, hvussu londini fremja sáttmálan í verki. Hoyringin er fyri kongsríki Danmarkar – Tað eru Føroyar, Danmark og Grønland. Londini svara hvør sær.

Í sambandi við niðurstøðuna frá hoyringini hevði ST nevndin ávís tilmæli og viðmerkingar. Tilmælini og viðmerkingar frá ST nevndini eru ítøkiliga orðað til einstøku londini í danska ríkinum, umframt til kongsríki Danmarkar, har londini eru nevnd undir einum. Talan er um almenn tilmæli, ið leggja upp til, at londini hvør í sínum lagi fylgja teimum.

ST nevndin leggur áherðslu á, at tey mæla til, at øll tilmælini verða framd í tøttum samráði og virknum samstarvi við áhugafeløg, ið umboða fólk, ið bera brek.

Tilmælini beinleiðis rættað mótvegis Føroyum eru hesi[2]:

| Grein | Nr. í ensku útgávu | Tilmæli |
|---|---|---|
| 1-4 Endamál, allýsingar og almennar reglur og skyldur | 8 | At breksáttmálin verður innlimaður í føroyska lóggávu, og at stig verða tikin til at sáttmálin verður nýttur sum grundarlag í arbeiðinum hjá dómstólunum og í almennu umsitingini sum heild. |
| 1-4 Endamál, allýsingar og almennar reglur og skyldur | 12 | At langtíðar brekpolitiskar virkisætlanir verða gjørdar, ið fevna um øll rættindi og økir í breksáttmálanum. Virkisætlanirnar skulu millum annað fevna um tær grundleggjandi broytingar, ið eru neyðugar at fremja, millum annað í mun til greinarnar 12, 14, 15, 19 og 24. |

[1] Upprunaskjalið frá ST nevndini varð útgivið hin 5. september 2024:
Committee on the Rights of Persons with Disabilities (CRPD) Concluding observations on the combined second and third periodic reports of Denmark. CRPD/C/DNK/CO/2-3.
[2] Í upprunaskjalinum ber til at lesa tilmælini til øll londini, grundgevingar fyri tilmælunum, og aðrar viðmerkingar frá ST nevndini.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
☏ (+298) 30 40 00 • ✉ ammr@ammr.fo • www.ammr.fo

| | | |
|---|---|---|
| | | Virkisætlanirnar skulu áseta neyv endamál, ítøkilig mál, sum kunnu mátast, við nøktandi fíggjarætlan og ávísarum (indikatorum), sum verða nýttir til at eftirmeta framstig í íverksetanini av virkisætlanunum. Harumframt verður mælt til, at vitanin um breksáttmálan verður breidd út bæði hjá landi og kommunum. |
| 1-4 Endamál, allýsingar og almennar reglur og skyldur | 16 (1) | At menna og seta í verk lógarfestar mannagongdir, sum tryggja, at fólk, ið bera brek, verða hoyrd og fáa møguleika at luttaka tvørtur um allar geirar og í øllum málum, ið viðvíkja teimum. |
| 1-4 Endamál, allýsingar og almennar reglur og skyldur | 16 (2) | At tryggja nøktandi atkomu til hoyring og seta nøktandi ummælistíð av til feløgini, so at gjørligt verður hjá teimum at umrøða málini innanhýsis við sínar limir. |
| 5 Javnrættindi og eingin mismunur | 18 (b) | At seta í gildi nýggja tvørgeiraliga lóg, sum bannar øllum mismuni vegna brek, eisini uttanfyri arbeiðsmarknaðin, og sum ásetir krav um rímiliga tillaging. |
| 7 Børn, ið bera brek | 28 | At munagóð stig verða tikin at hoyra børn og ung, ið bera brek, umvegis umboðandi feløg teirra, í tilgongdini at smíða nýggja barnalóg. |
| 7 Børn, ið bera brek | 30 | At málmenning rættstundis verður tryggjað børnum við CI og teirra avvarðandi. |
| 11 Vandastøður og menniskjalig neyðstøða | 38 | At áhugafeløg verða tikin við í arbeiðið at menna eina skipan, ið eyðmerkir og hevur eftirlit við flóttafólki, sum bera brek – harundir fólk í flóttafólkalíknandi støðum, íroknað fólk úr Ukraina, sum hava fyribils uppihaldsloyvi – ið tryggjar neyðug rættindi, javnbjóðis atgongd til vælferðartænastur, og rímiligar tillagingar í gerandisdegi teirra. |
| 13 Atgongd til rættarskipanina | 42 | At áhugafeløg verða tikin við í arbeiðið at menna eina ætlan, ið tryggjar fólki, ið bera brek, atgongd til rættarskipanir í fyrisitingarligum og rættarligum málum.<br>Ætlanin skal fevna um tiltøk til at broyta mannagongdir í revsi-, borgara-, arbeiðs- og fyrisitingarlóg, sum tryggja aldurshóskandi tillagingar fyri fólk við breki, ið skal fevna um øll lið, so sum partar í einum máli; dómarar, sorinskrivara, fyrisitarar, skrivstovufólk og annað starvsfólk í rættarskipanini, uttan kostnað. Eisini skal hon vísa á ætlanir um áhaldandi at upplæra starvsfólk í fyrisitingarligu og rættarligu skipanini, herundir limir í dómsvaldinum, fyrisitarar, løgreglufólk, ákærar og starvsfólk í fongslunum um tey rættindi, ið fólk, ið bera brek, hava sambært sáttmálanum. |
| 16 Sleppa undan eyðræning, harðskapi og misnýtslu | 48 (b) | At Istanbul sáttmálin – um at fyribyrgja og beina fyri harðskapi móti kvinnum og harðskapi í nærsambondum – verður settur í gildi í Føroyum. |
| 21 Talufrælsi, meiningarfrælsi | 60 (a) | At átøk verða gjørd fyri at tryggja atkomu til teknmál, harundir átøk fyri at útbúgva fleiri teknmálstulkar. Mælt verður til at nøktandi fígging verður sett av til teknmál. |

| | | |
|---|---|---|
| og atgongd til upplýsingar | | |
| 22 Virðing fyri privatlív | 62 | At broytingar verða gjørdar í lóggávu, ið forða fyri, at viðkvæmar upplýsingar um sjúklingar í psykiatriska deplinum verða latnar til ein triðja part uttan samtykki frá sjúklinginum. |
| 28 Nøktandi lívskor og almannavernd | 74 | At broytingar verða gjørdar í lóggávu, ið tryggja, at fólk, ið bera brek, ið gerast fólkapensjónistar, kunnu varðveita veitingar og stuðul, ið tey fáa orsaka av breki sínum. |
| 30 At vera uppi í mentanarlívi, ítrivi, frítíðarlívi og ítrótti | 80 | At staðfesta og seta í verk Marrakesh-sáttmálan um at stuðla undir atgongd til útgivin verk til teirra, ið eru blind, sjónveik, ella sum av eini ella aðrari orsøk ikki fáa lisið vanligan tekst. |
| 31 Hagtals- og dátuinnsavning | 84 | At framleiða hagtøl og menna hagtals- og granskingarskipanir um fólk, ið bera brek, sum vísa tær forðingar, ið hesi uppliva, og teirra verandi lívskor, sum kunnu verða haldgott vitanargrundarlag, tá ið stig verða tikin til at tilevnað og íverkseta politikkir sum fremja sáttmálan í verki. |
| 33 Innlendis ígildisetan og eftirlit | 88 (a) | At ein samskipandi eind verður sett á stovn, sum hevur til uppgávu at samskipa íverksetanina av sáttmálanum innanhýsis í landsstýrinum. |
| 33 Innlendis ígildisetan og eftirlit | 88 (b) | At søkja um akkreditering fyri Brekumboðið við A-statusi hjá Global Alliance og National Human Rights Institutions (GANHRI). |

Tilmælini til kongsríki Danmarkar (tilmæli til øll trý londini) eru hesi:

| **Grein** | **Nr. í ensku útgávu** | **Tilmæli** |
|---|---|---|
| 1-4 Endamál, allýsingar og almennar reglur og skyldur | 10 (1) | At ein umfatandi eftirmeting verður gjørd av verandi lóggávu fyri at tryggja, at lógir eru í tráð við meginreglur, allýsingar, rættindi og skyldur í breksáttmálanum, og at lógir, ið skapa afturstig fyri fólk, ið bera brek, verða rættaðar. |
| 1-4 Endamál, allýsingar og almennar reglur og skyldur | 10 (2) | At tiltøk frameftir ikki verða sett í verk, ið skapa afturstig fyri fólk, ið bera brek. |
| 5 Javnrættindi og eingin mismunur | 20 | At stig verða tikin, millum annað við lóggávu, til at tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek, at hava atgongd til tryggingar, eisini frá privatum aktørum, á jøvnum føti við onnur. |
| 5 Javnrættindi og eingin mismunur | 22 | At taka rímulig stig til at tryggja at javnstøðunevndin fær nøktandi orku til at minka um tíðina tað tekur at viðgera mál, ið viðvíkja mismuni vegna brek, og at tryggja møguleika at handhevja rættindini hjá fólki, ið bera brek. |

| | | |
|---|---|---|
| 6 Konufólk, ið bera brek | 24 (1) | Við støði í almennu viðmerking nr. 3 (2016)[3] um rættindi hjá kvinnum og gentum, ið bera brek, at tryggja, at sjónarmið viðvíkjandi kyni og breki verða tikin við í lóggávu og ætlanum, eins og í íverksetan og eftirmeting av hesum. |
| 6 Konufólk, ið bera brek | 24 (2) | At tryggja skipaða dátuinnsavnan og regluligar kanningar av støðuni hjá kvinnum og gentum, sum bera brek. |
| 8 Tilvitsku-stimbran | 32 | At gera eina langtíðarætlan fyri at forða fyri fordómum og stimbra tilvitskuna hjá eitt nú almenninginum, almennu umsitingini, vinnulívinum, politikarum og dómarum. |
| 9 Atkoma | 34 (a) | At endurskoða lóggávu, sum loyvir undantøkum frá at fylgja atkomustandardum í bygningum, her undir til familjubústaðir og tænastur, og at stig verða tikin til at víðka lógarásettu standardir fyri atkomu til at fevna um øll almenn støð, bygningar og tænastur, sum eru opin fyri almenninginum. |
| 9 Atkoma | 34 (b) | At samtykkja og seta í verk eina landsdekkandi heildarætlan, ið eyðmerkir verandi forðingar fyri atkomu, og veitir neyðugu menniskjaligu, tøkniligu og fíggjarligu amboðini at beina burtur hesar forðingar og áleggur kommunum skyldur at gera ætlanir eins og at fylgja upp.<br>Heildarætlanin skal tryggja fólki, ið bera brek, atkomu til millum annað bygningar (undir hesum nýggjar bygningar, bygningar, sum verða umvældir, og søguligar bygningar), óslættar vegir, flutning, kunning og samskifti (undir hesum upplýsingartøkni og samskiftistøkni), og aðrar hentleikar og tænastur, sum verða veittar. |
| 9 Atkoma | 34 (c) | At átøk verða gjørd fyri at fremja tilvitsku-stimbran um hugtakið algilt snið (EN: *universal design*) millum almenn starvsfólk, millum annað arkitektar, verkfrøðingar og starvsfólk, sum arbeiða innan økið, eitt nú við gongubreytum, hallum og nýggjari tøkni. |
| 9 Atkoma | 34 (d) | At stig verða tikin til at nýta Web Content Accessibility Guidelines og til at beina burtur forðingar, sum forða fólki, ið bera brek, at fáa algilda og javnbjóðis atkomu til heimasíður og talgilt samskifti. |
| 9 Atkoma | 34 (e) | At veita virknan stuðul, umframt atgongd til hjálpartól og samskifti, undir hesum vegleiðarar, upplesarar og yrkisteknmálstulkar, fyri at tryggja atkomu til almennar bygningar og onnur hølir, sum eru opin fyri almenninginum. |
| 9 Atkoma | 36 | At stig vera tikin til at tryggja, at fólk við niðursettari hoyrn fáa atgongd til fjartulking alt samdøgrið og til allar viðkomandi myndugleikar. |
| 12 Eins fyri lógini | 40 (a) | At tillaga Verjumálslógina, so øll fólk, ið bera brek, eru tryggjað løgfrøðilig rættindi, og endurskoða øll verandi verjumál og reglugerðir um forboð og verjumál og tillaga tey til nýggju skipanina við stuðli at taka avgerðir sjálvur. |
| 12 Eins fyri lógini | 40 (b) | At savna inn hagtøl um verjumál hjá fólki, ið bera brek, greinað eftir etniskum uppruna, kyni, aldri, breki og øðrum viðkomandi viðurskiftum. |

[3] CRPD/C/DNK/CO/1, para.19

| | | |
|---|---|---|
| 12 Eins fyri lógini | 40 (c) | At beina burtur øll sløg av verandi skipanum, sum taka avgerðir fyri annan, og seta í verk skipanir, ið stuðla øðrum at taka avgerðir sjálvi, sum virða viljan og ynskini hjá fólki, ið bera brek, í øllum lívsviðurskiftum. Mælt verður somuleiðis til at menna eina heildarætlan fyri at seta í verk skipanir tvørtur um landsfyrisiting og kommunala fyrisiting, ið stuðla øðrum at taka avgerðir sjálvi við hóskandi og rímiligari vernd. |
| 14 Frælsi og trygd hins einstaka | 44 (a) | At ógilda allar lógir og avtaka alla praksis, sum loyvir frælsistøku og tvingsilsviðgerð, orsaka av breki, herundir lógir um sálarliga heilsu og stovnsgerð. |
| 14 Frælsi og trygd hins einstaka | 44 (b) | At broyta viðkomandi lóggávu fyri at tryggja, at børn og ung við breki ikki kunnu verða sett á tryggjaðar bústovnar við tí grundarlagi at tað er betur fyri teirra vælferð. |
| 14 Frælsi og trygd hins einstaka | 44 (c) | At byrja eina skipanarliga endurskoðan av mannagongdum, sum verða nýttar til at revsa fólk, ið bera brek, sum verða mett óegnað at skula fyri rættin, við tí fyri eyga at tryggja, at tey ikki verða dømd til longri revsing enn onnur, og at øll rættarfyrilit, so sum meginreglan um sakloysi, rættin til rættvísa rættargang og onnur, verða tryggjað til fulnar. |
| 14 Frælsi og trygd hins einstaka | 44 (d) | At gjøgnumganga øll mál um frælsistøku av fólki, ið bera brek, sum í løtuni eru á sjúkrahúsum, stovnum og øðrum støðum fyri frælsistøku, ið byggir á ikki-brotsliga dómsavgerð ella fyrisitingarliga avgerð, og flyta tey í ein bústað úti í samfelagnum eftir egnum ynski, við atgongd til eina røð av stuðulstænastum. |
| 14 Frælsi og trygd hins einstaka | 44 (e) | At viðurkenna opna brævið frá ST nevndini frá juni 2021[4] - og í framtíðar luttøku í ein og hvørja tilgongd at fáa eina eyka protokol ella tilmæli til Oviedo-sáttmálan - ikki stuðla tvingsilsátøkum, men virka fyri at fremja eina ikki-tvingsilsrammu fyri sálarheilsu. |
| 15 Frælsi frá píning ella miskunnarleysari, ómenniskjaligari ella niðrandi viðferð ella revsing | 46 (a) | At taka øll neyðug stig at broyta lóggávu, fyrisiting og rættarskipan, við tí fyri eyga at banna nýtslu av tvingsli, tvingsilsviðgerð og avmarkandi siðvenjum fyri børn og vaksin, ið bera brek, sum framvegis eru á stovnum, umsorganarheimi og á psykiatriska deplinum vegna frælsistøku; og heldur seta aldurshóskandi stuðulstiltøk í verk, sum virða viljan, ynskir, virðir og rættindi hjá tí einstaka, umframt at veita øllum starvsfólkum viðkomandi útbúgving. |
| 15 Frælsi frá píning ella miskunnarleysari, ómenniskjaligari ella niðrandi viðferð ella revsing | 46 (b) | At seta á stovn sterkar eftirlitsskipanir og styrkja verandi eftirlitsskipanir fyri at tryggja regluligt eftirlit við stovnum, ið nýta tvingsil á almanna-, heilsu-, og eldraøkinum, og tryggja regluliga almenna fráboðan til Løgtingið. |
| 16 Sleppa undan eyðræning, harðskapi og misnýtslu | 48 (a) | At víðari menna og seta í verk tvørgangandi, víðfevnandi og munadyggar heildarverkætlanir fyri at fyribyrgja og forða harðskapi í Føroyum, í samsvari við meginreglur og standardar í sáttmálum. |

[4] Sí:https://view.officeapps.live.com/op/view.aspx?src=https%3A%2F%2Fwww.ohchr.org%2Fsites%2Fdefault%2Ffiles%2FDocuments%2FHRBodies%2FCRPD%2FOpen_letter_Add_Prot_Ovi_Conv.docx&wdOrigin=BROWSELINK

| | | |
|---|---|---|
| | | Endamálið við politisku menningar- og broytingarátøkunum eigur at vera at menna lógarpartin til eisini at rúma meginreglum og standardum úr altjóða sáttmálum, við neyvum krøvum til mentan, kyn og aldur, at fáa lýst allar kendar harðskapsformar mótvegis børnum og vaksnum við breki úr øllum samfelagnum, eisini á stovnum, ætlanir fyri at stimbra tilvitskuna í samfelagnum og atgongd til rættarskipanina. Somuleiðis er neyðugt at fyriskipa hóskandi stuðul og endurmenning í mun til mentan, kyn, aldur og rehabilitering. |
| 16 Sleppa undan eyðræning, harðskapi og misnýtslu | 48 (c) | At tryggja, at eftirlitsmyndugleikar røkka út til allar stovnar og støð, har børn og vaksin, ið bera brek, verða afturhildin, eru varðhaldsfongslað ella búgva. |
| 17 Verja sjálvræðisrætt (integritet) hins einstaka | 50 | At løgfrøðiliga og politiska grundarlagið verður broytt til tess at forða mannagongdir at sterilisera, gitnaðarforða, og geva fosturtøku til konufólk og gentur, ið bera brek, ímóti teirra upplýsta, frælsa og persónliga vilja. |
| 19 At liva sjálvstøðugt og verða tikin upp í samfelagið | 56(a) | At gera tvørgeiraligar ætlanir, ið hava til endamáls at niðurlaga stovnsgerð fyri øll fólk, ið bera brek. Ætlanirnar eiga at áseta eina neyva tíðarrammu og neyðuga fígging fyri at tryggja, at fólk, ið bera brek, fáa atgongd til hóskandi bústaðarmøguleikar í nærumhvørvinum, sum er í samsvari við vilja og ynski teirra. |
| 19 At liva sjálvstøðugt og verða tikin upp í samfelagið | 56 (b) | At taka stig til at niðurlaga verandi stovnsgjørdar bústovnar og fyribyrgja, at fólk, ið bera brek, verða flutt úr bústaði sínum ímóti vilja sínum og uttan kunnað samtykki. |
| 19 At liva sjálvstøðugt og verða tikin upp í samfelagið | 56 (c) | At tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek, at velja bústað uttan mun til brek ella samansetta stuðulin, ið teimum tørvar, at veita neyðugan stuðul til fólk við breki at luttaka í útbúgving, á arbeiðsmarknaðinum, til mentanarlig tiltøk ella at taka lut í sosialum felagsskapi. |
| 21 Talufrælsi, meiningarfrælsi og atgongd til upplýsingar | 60 (b) | At seta tiltøk í verk fyri at tryggja nøktandi fígging til at stuðla, varðveita og økja um kunnleikan og nýtsluna av blindaskrift, serliga við at skipa felags undirvísingarhættir. |
| 24 Útbúgving | 66 (a) | At taka børn, sum bera brek, við í dygdargóða, fevnandi útbúgving, og taka burtur tær forðingar, sum hava forðað fyri effektivum skifti frá serundirvísing til dygdargóða fevnandi undirvísing. |
| 24 Útbúgving | 66 (b) | At viðgera hugburðsforðingar, sum forða fyri, at børn, sum bera brek, verða fevnd í útbúgvingum, eitt nú við at betra um útbúgvingina hjá lærarum í fevnandi undirvísingarhættum, og at gera skipanarligar broytingar á skúlunum og í skipanini sum heild. |
| 24 Útbúgving | 66 (c) | At veita neyðugar stuðulsskipanir í útbúgvingarskipanini, herundir teknmál. |
| 24 Útbúgving | 66 (d) | At gera leiðreglur fyri rættstundis at eyðmerkja vandan fyri at næmingar, ið bera brek, fara úr útbúgvingini, og tryggja øllum børnum javnbjóðis atgongd til útbúgving, eitt nú við at tryggja, at næmingar, ið |

| | | |
|---|---|---|
| | | bera brek, fáa møguleika at taka yrkisútbúgvingar og starvsvenjing, ið leggur upp fyri skerdum førleikum. |
| 25 Heilsa | 68 (1) | At tryggja, at fólk, ið bera brek, serliga fólk við menningartarn og/ella sálarligum breki, fáa best møguligu atgongd til heilsutænastur á jøvnum føti við onnur. |
| 25 Heilsa | 68 (2) | At tiltøk vera gjørd, eitt nú uppsøkjandi átøk og tiltøk, ið betra um atkomu innan heilsuøkið, við tí fyri eyga at økja um luttøkuna hjá fólki, sum bera brek, her undir í fólkaheilsutiltøkum, so sum kanningum fyri lívmóðurhálskrabba, bróstkrabba og tarmkrabba. |
| 26 Menning og endurmenning | 70 | At átøk vera gjørd fyri at tryggja fólki, ið bera brek, atgongd til umfatandi og tvørgangandi habiliterings- og endurvenjingartænastur. Mælt verður til at tryggja, at hjálpartól og starvsfólk við serkunnleika til serligu krøvini hjá fólki, ið bera brek, eru tøk. |
| 27 Arbeiði og starvssetan | 72 | At ein langtíðarætlan verður gjørd, ið hevur til endamáls, at fólk, ið bera brek, fult og heilt verða fevnd á vanliga arbeiðsmarknaðinum.<br><br>Ætlanin skal hava:<br>a) málrættaðar, tíðaravmarkaðar og fíggjaðar ætlanir tvørtur um allar geirar í búskapinum,<br>b) kunningarátøk, ið hava til endamáls at niðurbróta fordómar mótvegis fólki, ið bera brek, og<br>c) frálæru og serkunnleika til starvsfólk í arbeiðsskipanini, her undir kveikjarar, um brekviðurskifti.<br><br>Stuðul skal veitast fólki, ið bera brek, meðan tey leita eftir arbeiði og í teirra royndum at gerast sjálvstøðug vinnurekandi við atliti at brekinum. Eisini skal tryggjast, at eldri starvsfólk, ið bera brek, sum enn ikki hava rokkið pensjónsaldur, hava møguleika at verða verandi á arbeiðsmarknaðinum. |
| 29 At vera við í politiskum og almennum lívi | 76 (a) | At tryggja rættin hjá øllum, ið bera brek, at atkvøða og at stilla upp uttan undantak ella útihýsing. |
| 29 At vera við í politiskum og almennum lívi | 76 (b) | At gera valstøð og atkvøðuseðlar atkomilig, at veita valupplýsingar og tilfar í atkomuligum sniðum, og veita tann stuðul, sum fólk við menningartarni og/ella sálarligum breki tørva fyri at nýta sín valrætt á effektivan hátt. |
| 30 At vera uppi í mentanarlívi, ítrivi, frítíðarlívi og ítrótti | 78 (a) | At tryggja, at fólk, ið bera brek, fáa atgongd til mentanarligt tilfar, sjónvarpssendingar, filmar, sjónleik og annað mentanarligt virksemi, eins og til støð, ið húsa mentanarligum framførslum, ella tænastur, eitt nú leikhús, søvn, biografar og bókasøvn, ferðavinnutænastur og ítróttartænastur. |
| 30 At vera uppi í mentanarlívi, ítrivi, frítíðarlívi og ítrótti | 78 (b) | At betra um tey átøk, ið vera gjørd fyri at tryggja, at fólk, ið bera brek, serliga børn, kunnu nýta sín rætt til at luttaka í mentanarlívi, frítíðarítrivi, frítíðarlívi og ítrótti á jøvnum føti við onnur. |